Fróðskaparsetur Føroya

9. november 2009

**Fundarfrágreiðing til stýrisfund nr. 7/2009**

| | |
|---|---|
| Dagur og klokkutíð: | Týsdagin 5. november kl. 11.30 – 17.00 |
| Fundarstað: | Søgu- og samfelagsdeildin, Jónas Broncks gøta 25 |
| Til staðar: | Herálvur Joensen, stýrisformaður, Jan Mortensen, næstformaður, Juanna Joensen, Winny í Pætursastovu, Robert (Jim) Brown, Anni Djurhuus, Jóan Pauli Joensen, rektari og Rúna Hjelm, fyrisitingarstjóri. Rúna Hjelm var ikki til staðar undir viðgerðini av máli 9.<br>Hugin Skaalum, fíggjarleiðari, var til staðar undir viðgerðini av málunum 4, 5 og 7. |

**Dagsskrá:**

1. **Kunning um undirvísing, inntøkufíggjað virksemi v.m. á Sjúkrarøktarfrøðiskúlanum og á Søgu- og samfelagsdeildini.** (J.nr. (3) 10-02-20070017 og (3) 10-02-20070024).
Súsanna Mortensen kunnaði um dagføringina av sjúkrarøktarfrøðiútbúgvingini, ískoytisútbúgvingini í sjúkrarøkt og klinisku vegleiðaraútbúgvingini. Hon legði dent á, at hóast útbúgvingarnar á Sjúkrarøktarfrøðiskúlanum avgjørt eru á sama støði sum í londunum rundan um okkum, er tað tó ein tørvur á at gera eina ætlan fyri førleikamenning av lærarunum á skúlanum, tí lærararnir hava sum er ikki granskaraútbúgving (PhD-útbúgving). Á deildunum á Fróðskaparsetrinum og universitetunum í londunum rundan um okkum er tað eitt krav, at vísindastarvsfólk skulu hava granskaraførleika eftir eina ávísa tíð í starvinum. Hon vísti á, at hetta væntandi verður ein trupulleiki fyri Setrið, tá tað um knapt trý ár, eftir lógini, skal eftirmetast (akkrediterast) av uttanlands serfrøðingum.

Kári á Rógvi greiddi frá møguleikunum fyri at menna inntøkufíggjað virksemi á Søgu- og samfelagsdeildini. Henda deildin hevur royndir við at skipa fyri inntøkufíggjaðum skeiðum í bæði lóg og stjórnmálafrøði. Deildin hevur merkt, at tað er ein stórur tørvur á eftirútbúgvingartilboðum, og tey skeið, sum deildin higartil hevur bjóðað út, hava verið stak væl umtókt. Serliga er ein eftirspurningur eftir skeiðum við viðkomandi føroyskum evnum, serliga innan lógarøkið. Stýrið bað Kára á Rógvi skriva eitt notat, sum útgreinar, hvussu Setrið kann víðka um eina tílíka skeiðstænastu.

2. **Góðkenning av 6/2009 stýrisfundi 1. og 2. september 2009.**
Fundarfrágreiðing 6/2009 varð góðkend.


| Poststaður | Bústaður | Heimasíða | T-postur | Telefon | Faks |
|---|---|---|---|---|---|
| Postrúm 272<br>FO 110 Tórshavn | J. C. Svabos gøta 14<br>FO 100 Tórshavn | www.setur.fo | setur@setur.fo | 35 25 00 | 35 25 01 |

3. **Góðkenning av dagsskrá.**
Dagsskráin varð góðkend við broytingum. Mál 8, 10 og 13 vórðu viðgjørd eftirfylgjandi.

4. **Fíggjarstøðan 2009.** (J.nr. (3) 10-12-20070011).
Fíggjarleiðarin legði fram frágreiðingina um fíggjarstatus fyri oktober 2009. Frágreiðingin varð tikin til eftirtektar.

5. **Kunning um fíggjarlógaruppskot fyri 2010.** (J.nr. (3) 10-11.01-20070008).
Fyrisitingarstjórin kunnaði um uppskot til fíggjarætlan fyri 2010. Í fíggjarlógaruppskotinum fyri 2010 verður lagt upp til, at allar lønir á øllum deildum, skúlum og depli hækka við 3 prosentum komandi ár – tó so at lønarparturin av eykajáttanini, sum Setrið fekk tillutað í 2009, ikki verður framskrivaður. Um sæð verður burtur frá 3 prosent hækkingini í lønum, verður játtanin í 2010 til Sjúkrarøktarfrøðiskúlan, Læraraskúlan og Granskingardepilin óbroytt, um nevnda uppskot verður samtykt. Í sama uppskoti er lagt upp til, at Fróðskaparsetrið fær eina hækking á 1.800 tkr. til lønir á Søgu- og samfelagsdeildini í 2010. Umframt hetta er ætlanin, at fleiri øki skulu leggjast undir Fróðskaparsetrið. Hesi øki eru Altjóða Skrivstovan, ES-samstarvið, LFÚ og Eftirútbúgvingin av lærarum. Mentamálaráðið hevur boðað frá, at Setrið skal kunnast nærri um hetta seinni í heyst. Eisini er ætlanin, at Læraraskúlin og Sjúkrarøktarfrøðiskúlin skulu hava hvør sína undirkonto undir rakstrarstaðnum hjá Fróðskaparsetrinum, og tey verða sostatt ætlandi ein integreraður partur av játtanini hjá Setrinum fyri 2010. Stýrið varð eisini kunnað um, hvørji vísindastørv ætlanin er at lýsa eftir, um fíggjarlógaruppskotið verður samtykt. Stýrið hevði ynski um, at ein meiri nágreinilig kunning um fíggjarlógaruppskotið verður send stýrislimunum eftir fundin. Stýrið tók frágreiðingina til eftirtektar.

6. **Reglugerð fyri stýrið á Fróðskaparsetrinum og fyri stýrisarbeiðnum.** (J.nr. (3) 10-00-2007009).
Stýrisformaðurin legði fram eitt uppskot til reglugerð fyri stýrisarbeiðið. Uppskotið varð umrøtt, og niðurstøðan av málinum varð, at stýrið skal arbeiða víðari við reglugerðini.

7. **Samsýning til stýrislimir.** (J.nr. (3) 10-01-20070018).
Mentamálaráðið (MMR) hevur avgreitt málið um samsýning til stýrislimir. Leisturin fyri samsýning byggir á eina góðkenning frá lønardeildini dagfest 26. oktober 2009. Á fundinum tók stýrið undir við uppskotinum frá MMR.

**Kunning:**

8. **Framtíðar bygnaður á Fróðskaparsetrinum.** (J.nr. (3) 10-00-20070013).
Fyrisitingarstjórin kunnaði um samansetingina av limunum í bygnaðarbólkinum, sum skal arbeiða við at greina møguleikarnar fyri framtíðar bygnaði á Setrinum. Limirnir bygnaðarbólkinum eru:

Súsanna Mortensen, Sjúkrarøktarfrøðiskúlin, formaður í bólkinum
Rúna Hjelm, Setursskrivstovan, skrivari í bólkinum
Hans Pauli Joensen, Náttúruvísindadeildin
Kári á Rógvi, Søgu- og samfelagsdeilin
Zakaris Svabo Hansen, Føroyamálsdeildin
Randi Durhuus, Setursskrivstovan

Jóannes Hansen, Læraraskúlin
Anni Djurhuus, lesandi
Hanna Horn, lesandi
Birgit Fredriksberg, lesandi

Fyrsti fundurin í bygnaðarbólkinum verður 19.11.09 kl. 13.00 á Sjúkrarøktarfrøðiskúlanum. Stýrið tók kunningina til eftirtektar.

9. **Fyrisitingarstjórastarvið.** (J.nr. (3) 10-22.01-20070016 og (3) 10-21.01-20070010). Uppskot til lýsing eftir fyrisitingarstjóra varð lagt fram, onkrar minni viðmerkingar vóru til tekstin. Avgjørt varð, at rektarin skuldi taka upp samband við Mentamálaráðið um innplasering og sum skjótast avgreiða málið, kortini so at formaðurin varð kunnaður áðrenn.

10. **Strategiarbeiðið.** (J.nr. (3) 10-11.01-20070005). Fyrisitingarstjórin kunnaði um strategitilgongdina á deildunum á Setrinum. Tað er eitt sindur ymiskt, hvussu langt deildirnar eru komnar í tilgongdini, og hvussu strategiarbeiðið verður lagt til rættis. Stýrið legði dent á, at deildirnar skulu lata upp fyri at arbeiða uppá tvørs í strategitilgongdini. Kunningin varð tikin til eftirtektar.

11. **Nýggjar starvssetanir á Setrinum.** Rektarin kunnaði um nýggjar starvssetanir á Setrinum. Stýrið tók kunningina til eftirtektar.

12. **Kanning, sum Granskingardepilin fyri Samfelagsmenning skal gera fyri Fróðskaparsetrið.** (J.nr. (3) 10-61.01-20070002). Fyrisitingarstjórin greiddi frá um fyribilsúrslitið frá einari kanning, sum Granskingardepilin er í ferð við at gera fyri deildirnar á Setrinum. Stýrið avgjørdi, at leiðslan á Setrinum skal bíða við at kunna um úrslitini av kanningini, til frágreiðingin frá Granskingardeplinum er liðug.

13. **Kunning frá leiðararfundinum 26. oktober 2009.** (J.nr. (3) 10-01-20070020). Fyrisitingarstjórin kunnaði um seinasta leiðarafund á Setrinum. Ein niðurstøða frá hesum fundi varð, at neyðugt er at skipa allar útbúgvingarnar á Setrinum eftir sama leisti. Við einari tílíkari broyting ber til at leggja til rættis fyri, at lesandi kunnu taka skeið hjá øðrum deildum á Setrinum. Á leiðarafundinum var eisini tikið undir við, at deildirnar á Setrinum skulu miða ímóti at hava felags innleiðsluskeið fyri nýggj lesandi frá heystinum 2010. Eisini varð ein felags kunningarbólkur settur, sum skal arbeiða við at profilera allar útbúgvingarnar á Setrinum. Kunningin varð tikin til eftirtektar.

14. **Fundaætlan fyri komandi ár.** (J.nr. (3) 10-01-20070024). Samtykt varð, at komandi fundirnar skulu verða 16. og 17. mars, 12. mai og 10. september 2010.

15. **Ymiskt.** Rektarin kunnaði stýrið um ein fyrispurning, sum Setrið hevði fingið frá Listasavni Føroya um at læna málningin "Tey ganga á vegnum og bíða" eftir Ingálvi av Reyni út til eina framsýning, sum savnið skipar fyri. Stýrið samtykti at loyva hesum, um Listasavnið kann tryggja og hava ábyrgdina av málninginum, frá tí at hann verður tikin niður, og til hann er

komin upp á pláss aftur, og Setrið hevur góðkent, at alt er í lagi. (J.nr. (3) 10-38.01-20070031).

Mentamálaráðið heitir á stýrið um at velja 3 umboð til eina staðarnavnanevnd. Stýrið samtykti, at leiðslan á Setrinum ger eitt tilmæli, sum verður lagt fyri stýrið til samtyktar millum funda. (J.nr. (3) 10-01-20070031).

RH/JPJ 09.11.09